

Stril Mermaid skal skrásetast undir Merkinum. Mynd: Simon Møkster Shipping

# Simon Møkster flytur skip undir Merkið - og koyrir 70 sjófólk heim

**Jógvan Hugo Gardar**

12.05.2015 - 22:42

Oljan.fo

Stavanger-reiðarii Simon Møkster Shipping hevur boða starvsfólkum sínum frá at tvey av skipunum, Stril Odin og Stril Myster skulu leggjast, meðan Stril Mermaid skal flaggast út og skrásetast undir Merkinum. Orsøkin eru truplu viðurskiftini í oljuvinnuni.

- Vit halda at hetta er øgiliga keðiligt. Fyri eitt familjureiðarí sum Møkster, ið alltíð hevur ynskt at hava norskar sjómenn og at sigla undir norskum flaggi, so er hetta keviligt, sigur Henning Lystad, manningarstjóri hjá Simon Møkster Shipping, í samrøðu við Maritime.no.

At hesi trý veitingarskipini skulu úr norska flotanum rakar so nógv sum 70 av sjófólkunum. Enn er ikki greitt hvør sum missir arbeiði, tí Møkster-leiðslan sigur at talan verður ikki um at manningarnar á hesum skipunum verða koyrdar til hús. Tey 70 fólkini skulu finnast í øllum flotanum hjá reiðarínum, ið telur 25 skip.

Sum skilst ynskja tey í fyrstu atløgu at siga upp tey sum hava fingið starv seinast, men talan verður eisini um at hyggja eftir hvørjum tørvi reiðaríi hevur, og hvørjar royndir fólk hava.

Fleiri føroyingar sigla við skipunum hjá Simon Møkster Shipping